Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins:

# Leggja okkum ikki út í innanhýsis mál hjá Fólkaflokkinum

**-Hetta er eitt mál, sum er koyrt eftir forskriftunum í Stýrisskipanarlógini, og bólturin má liggja hjá teimum, sum hava hann. Vit fara ikki og taka bóltin frá nøkrum, uttan so at hann verður spældur yvir til okkara sigur Høgni Hoydal um Jørgen Niclasen málið. Hann metir tað tí verða eitt mál fyri landsstýrismannin, løgmann og flokk teirra. Ikki fyrr enn málið kemur í tingið er tað eitt mál fyri Tjóðveldisflokkin eisini**



*Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins*

KANNINGAR
*Jan Müller*

Í blaðnum í gjár undrast fyrrverandi landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Signar á Brúnni stórliga á, hví leiðslan í Tjóðveldisflokkinum er so tigandi í málinum, sum hevur tikið seg upp um embætisførsluna hjá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni. Hann vísir til, at hetta var so ikki støðan, tá ivi tók seg upp um hansara embætisførslu og hann mátti fara frá. Høgni Hoydal sigur við Sosialin, at hann hevur onga viðmerking til tað, sum Signar á Brúnni førir fram. –Tað eru tó fleiri onnur, sum hava spurt, hví flokkurin ikki hevur verið meira frammi í hesum málinum. Vit siga tað vit halda innanhýsis. Vit hava víst í slíkum málum, at vit taka tey upp innanhýsis og viðgera tey í flokkinum og millum teir persónar, sum eru partar av einum máli. Tað vóna vit, at aðrir gera eisini. Høgni Hoydal sigur, at teir hava heldur ongantíð fyrr verið úti alment og úttalað seg um mál, sum liggja hjá øðrum flokkum, øðrum landsstýrismanni ella løgmanni. Hann vil heldur ikki fara út og siga nakað alment um málið, fyrr enn tað hevur verið fyri í løgtinginum.

Høgni Hoydal leggur aftrat, at Tjóðveldisflokkurin letur bóltin liggja, har hann eigur at liggja, til hann so verður spældur yvir til flokkin.

*– Hvar eigur bólturin at liggja í løtuni?*

– Hetta er eitt mál um eftirlit við landsstýrismonnum. Tað verður gjørt antin av løgmanni ella av løgtinginum. Løgmaður hevur so heldur ikki tikið málið upp av sínum eintingum. Tí er tað tikið upp av løgtinginum. Tá liggur bólturin formelt í tinginum, har kanningarstjóri er settur. Men av tí at løgtingið ikki er saman liggur bólturin eisini hjá løgmanni, landsstýrismanninum og flokki teirra og hava teir í hesum førinum fingið eina rættiliga langa umhugsingartíð.

Høgni Hoydal vísir annars aftur gitingum um, at flokkurin vil ikki úttala seg alment um málið av ótta fyri at tað skal fáa avleiðingar fyri samgongusamstarvið. – Vit gera einki øðrvísi her enn vit gera í øllum øðrum málum. Tá mál hava verið fyri, sum snúgva seg um landsstýrisfólk hjá Tjóðveldisflokkinum, sum hava havt trupulleikar, so hevur tað ikki altíð verið av løgfrøðiligum slag. Tað er eisini tá, at tingini eru mett politiskt, men vit hava ongantíð verið úti og úttalað okkum um landsstýrisfólk hjá øðrum flokkum. Vit hava tó gjørt tað, tá málini enda í løgtinginum.

Høgni Hoydal hoydi ikki tjakið í útvarpinum mikudagin, men tá talan er um kanningar av hesum slag vísir hann til tey amboð, sum vit hava í Stýrisskipanarlógini. Hetta aktuella málið er so kannað eftir teimum reglum, sum Stýrisskipanarlógin fyriskrivar og so má tað gerast ein niðurstøða út frá tí.

Hvat viðvíkur tjakinum um jura kontra politikk, so sigur hann, at tað altíð er ein politisk metan í øllum málum. Tað var tað eisini í málunum viðvíkjandi Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen á sinni. Man kann ikki fáa eitt facit frá juristum. Man má meta um tingini politiskt, um tað skapar trupulleikar fyri starvið hjá einum landsstýrismanni oa. Tað merkir ikki, at nakar hevur gjørt nakað juridiskt skeivt. Tað er sum so tað sama sum hendi við málinum um Signar á Brúnni. Signar er jú langt síðani fríkendur fyri nakað juridiskt. Tað, sum hann sjálvur segði, tá avgerðin varð tikin, var, at hann vildi ikki sita í eini støðu, har hann var undir eini konstantari ákæru og ikki fekk arbeitt. Hann vildi gjarna ganga fram sum eitt gott fyridømi, og tað haldi eg eisini hann gjørdi. Signarmálið var tað fyrsta í føroyskum politikki, sum fekk avleiðingar. Og tað hevur gjørt, at eyka fokus hevur verið á hetta og at onnur seinni hava verið noydd til at taka støðu sum hann eisini gjørdi, tá hann valdi at fara frá.

*– Spurningurin er so, um hann valdi ella varð tvingaður at fara frá?*

– Tað er jú altíð ein kombinatión, sum eisini kemur fram nú. Tá kundi málið eisini verið endað í løgtinginum. Tað málið var heldur ikki ein spurningur um jura men um eina politiska meting, um tað var skilagott ella ikki og um man við tí kundi fáa betri arbeiðsumstøður hjá landsstýrismanninum, hjá samgonguni oø.

*– Løgmaður sigur, at landsstýrið framdi justitsmorð móti Signar á Brúnni, og Signar spyr í blaðnum í gjár, um tað ikki eigur at fáa fylgjur fyri tað landsstýrið?*

– Hatta má vera eitt mál millum Signar og løgmann. Eg vil ikki gera viðmerkingar til tað, sum løgmaður hevur sagt.

*– Tú følir sostatt ikki, at tú sum varaløgmaður og partur av landsstýrinum eisini var við til at fremja umrødda justitsmorð móti Signar á Brúnni?*

– Tað vil eg als ikki gera viðmerkingar til. Tað málið hevur einki við hetta at gera, og tí má man taka tað upp í øðrum samanhangi. Eg ætli mær so ikki inn í tað tjakið.



*Høgni Hoydal vil ikki gera viðmerkingar til úttalilsinii hjá løgmanni í »Signarmálinum«*



# Eingin katastrofa at fara frá

**Løgfrøðiliga er onki at koma eftir, sigur hann, men politiskt eru dagarnir kanska taldir. Hendir tað, so er tað kortini ongin persónlig katastrofa, tí tað eru treytirnar í politikki, sigur Jørgin Niclasen landsstýrismaður við fiskivinnumálum**

DEADLINE
*Ingi Rasmussen*



*Hetta eru treytirnar, tá tú ert landsstýrismaður, sigur Jørgin Niclasen, sum kanska noyðist av brúnni í Fiskimálaráðnum*

Hann er í sínum higartil harðasta ódnarveðri sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum. Lagnan stóð til at vera avjørd hósdagin 9. januar 2003.

Spurningurin er, um hann yvirlivdi dagin á brúnni. Og gjørdi hann tað, so stendur ein blóðtyst andstøða klár at reisa misálit, sum eisini fólk í samgonguni eru sinnað at styðja.

Jørgin Niclasen vardi seg líka til »deadline«, tá løgmaður skuldi skera ígjøgnum. Sjálvur heldur hann seg onki skeivt hava gjørt. Men avleiðingin kann kortini gerast, at hann antin verður koyrdur ella sjálvur leggur frá sær, tí hann gerst ein byrða fyri samgonguna og kann skala álitið á politisku skipanina.

Alt stavar frá, at ein kanningarstjóri hevur funnist at hansara umsting fyri handfaringina av umlegging av nøkrum lánum.

– Kanningarstjórin viðger málið juridiskt, men juridiskt er onki at fara eftir. Tað útilokar kortini ikki, at málið kann fáa ta politisku avleiðing, at eg noyðist frá. Eg veit um aðrar landsstýrismenn, sum hava lagt frá sær, hóast teir onki skeivt halda seg hava gjørt, sigur Jørgin Niclasen.

Hann stríðist fyri sínum politiska lívi, har hann er gyrdur í brøkur, men persónliga óttast hann ikki at missa sessin.

– Tað er ongin persónlig katastrofa fyri meg, um eg noyðist frá. Tað eru treytirnar, tá tú ert landsstýrismaður, tí tú veitst frammanundan, at tú bert hevur starvið í eitt avmarkað tíðarskeið, sigur Jørgin Niclasen.

Rýkur Jørgin Niclassen úr landsstýrinum, heldur hann kortini fram í føroyskum politikki, tí hann er valdur tingmaður fyri Fólkaflokkin í Vágum.

– Eg havi sagt við míni fólk í Fiskimálaráðnum, at tey hava onki at ræðast, tí eg eri tann fyrsti, sum rúki, um nakað er galið. Og tað skal eg nokk klára at liva við. Eg havi bæði tingsessin at detta afturá og eitt virki at reka, sigur hann.

Tá blaðið fór til prentingar, var landsstýrislagnan hjá Jørgin Niclasen framvegis óviss. Kanska løgmaður slepti honum av húkinum, men avleiðingin kundi vera, at øll samgongan kom sær í vandasjógv. Tí kundi hugsast, at skiparin í Fiskimálaráðnum noyddist í land eina tíð.

# Jørgin verjur seg til tað síðsta

**Niðurstøðurnar hjá kanningarstjóranum byggja á misskiljingar, sigur Jørgin Niclasen landsstýrismaður í sínari verjurøðu til løgmans. Áðrenn løgmaður skuldi fella dóm í málinum, sendi landsstýrismaðurin 20 síður við frágreiðingum og niðurstøðum frá sær sjálvum, umsitingini og serligu 3-mannanevndini til løgmann**



Mín metan er, at øll málini eru framd á einum haldgóðum grundarlagi í samsvar við lógina.

Hjálagt eru frágreiðingin frá fyrisitingini og viðmerkingarnar frá 3-mannanevdini.

Vinarliga

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður

*Endin á undirskrivaðu verjurøðuni hjá Jørgin Niclasen landsstýrismanni*

VERJURØÐA
*Ingi Rasmussen*

»Mín metan er, at øll málini eru framd á einum haldgóðum grundarlagi í samsvari við lógina«.

Kanska ikki so óvæntað, afturvísir Jørgin Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, allar ákærur um at hava verið á saman-stoytskós við lógina um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan, ið hava sett hansara landsstýrissess í vanda.

Tað ger hann í skrivligum viðmerkingum til løgmann, dagfestar 8. januar 2003.

Viðmerkingarnar hjá landsstýrismanninum byggja á eina frágreiðing frá umsitingini í Fiskimálaráðnum, sum er undirskrivað av Kaj P. Mortensen aðalstjóra og Heðin Weihe løgfrøðingi, og serligu 3-mannanevndini mannað við advokatunum Julionnu Klett og Anfinn V. Hansen og búskaparfrøðinginum Sjúrði Horsdal.

Niðurstøðan hjá landsstýrismanninum er, at øll málini eru viðgjørd eftir sama aðalleisti, einsljóðandi leiðreglum og siðvenjum og útint á einum haldgóðum grundarlagi í samsvari við lógina.

## Einføld lóg

Jørgin Niclasen førir fram, at lógin, sum talan er um, er sera einfald og stuttorðað. Hann hellir seg til endamálið við lógini, sum er at varðveita skipini á føroyskum hondum. Í løgtingsviðgerðini hevur hetta staðið hægri og havt størri týdning enn at orða nágreiniligar reglur fyri, hvussu málsviðgerðin av skuldarumleggingini skuldi fara fram, sigur hann.

Tí mátti umsitingin og 3-mannanevndin leggja lógartulkingar fyri málsviðgerðina.

Tað sama hevur kanningarstjórin Turið Debes Hentze advokatur gjørt, tá hon hevur viðgjørt málið. Og har fara partarnir skeivir av hvørjum øðrum.

Niðurstøðurnar hjá kanningarstjóranum eru »eyðsýnt ikki tær einastu galdandi og røttu«, sigur Jørgin Niclasen, »og ikki í samsvari við tulkingarnar hjá teimum, sum hava viðgjørt málini.«

## Misskiljingar

Landsstýrismaðurin heldur, at alt málið, sum tað er komið fram, byggir á misskiljingar. »Hevði kanningarstjórin frammanundan almannakunngerðini av frágreiðingini lagt høvuðsatfinningarnar fyri fyrisitingina, so høvdu nakrar misskiljingar ikki komu fyri og úrslitið verið eitt annað,« skrivar Jørgin Niclasen.

Samanumtikið sigur landsstýrismaðurin, at hann hevur góðkent málini í samsvari við tey tilmæli, sum eru komin frá 3-mannanevndini og síðan frá fyrisitingini.

»Eg eigi sum landsstýrismaður ongan leiklut í málsviðgerðini av einstøku málunum, og havi eg í mínum endaligu avgerðum fylgt niðurstøðunum frá fyrisitingini og 3-mannanevndini«, sigur Jørgin Niclasen í sínari verjurøðu fyri løgmanni.

Løgmaður skuldi fella politiskan dóm í málinum seinnapartin hósdagin, men vit fingu ikki dómin við, áðrenn blaðið fór til prentingar.

## 3-mannanevndin styðjar Jørgin

»3-mannanevndin metir sostatt ikki, at virðið á landskassans veðrættarstøðu er versnað við umleggingunum«.

Tað sigur serliga nevndin, ið skuldi gera ummæli, tá lánini hjá trimum rækjutrolarum vóru løgd um. Nevndin, sum er mannað við advokatunum Julionnu Klett og Anfinn V. Hansen og búskaparfrøðinginum Sjúrði Horsdal, hevur givið eina stutta frágreiðing til frágreiðingina hjá kanningarstjóranum Turið Debes Hentze advokati.

3-mannanevndin er av tí fatan, at hennara virksemi er útint í samsvari við lógina. Hon er eisini av tí fatan, at fyristing og landsstýrismaðurin hava fylgt teimum ummælum og tí viðgerðarleisti, sum 3-mannanevndin hevur lagt lunnar undir.

Sostatt styðjar nevndin landsstýrismannin, sum sigur seg onki skeivt hava gjørt.

**-ir**